# Kjak



Ann Hovland
*sjúkrarøktarfrøðingur á B7*

## Gerst ongin politikari eyðmjúkur?

Heri Mohr hevur um dagarnar eina sera góða grein, har hann sker út í papp, hvør trupulleikin er á m.ø. Landssjúkrahúsinum. Tað er ikki frákoyrdi sjúkrahússtjórin ella ovurnýtsla av heilivági, men harafturímóti politiska svikagerðin, tá ið føroyskir politikarar í hugmóði ikki bert skóru blokkin, men eisini dagføringina, sum m.a. skuldi tryggja meirkostnaðin av nýggjum heilivági. Men teir av somu politikarum, sum fingu danskt ískoyti, skóru hvørki í egnum samsýningum ella dagføring.

Er tað veruliga so galið, at politikararnir heldur vilja at sjúkrahúsverkið fer í forfall, syndabukkur verður útpeikaður, fær sekkin og at patientarnir ikki kunnu fáa tann nýggjasta heilivágin, sum veruliga ger mun, heldur enn at fáa sjúkrahúsverkinum tann pening til vega, sum vit hava lógarbundnan rætt til?



Edva Jacobsen
*Løgtingskvinna*

## Ríkisveitingin niðurskorðin í óðum verkum í 2001

Ríkisveitingin, sum er ein týdningarmikil partur av búskapinum, og ein stórur tryggleiki fyri vælferðina hjá Føroya fólki, bleiv av fullveldissamgonguni niðurskorðin við 366 mió. í 2001. (1 mió. pr. dag). Hetta bleiv gjørt, uttan at nakað var at seta inn í staðin.

Hesin niðurskurður hevur higartil kostað landskassanum 3.202 mió. umframt fastfrystingina, so talan er um rættiliga stóra upphædd, sum kundi verið nýtt til at gera gott við til tey sum búgva her á landi.

Hetta má sigast at vera sera ábyrgdarleyst, tí blokkurin er ætlaður til at gera mun í føroyska samfelagnum, soleiðis at vit kunnu hava tænastur til øll, sum her búgva, eisini tá Føroyar hava fíggjarligar trupulleikar og kreppan rakar, millum annað tá okkara høvuðsvinna, fiskivinnan, svíkur.

*1 mió. um dagin í fruminntøkum hevði gjørt stóran mun.*

Av tí at serliga fiskivinnan kann svinga sera nógv búskaparliga, rakar blokkniðurskurðurin sera hart, og tað eru nógv, ið merkja avleiðingarnar av hesum niðurskurði, tí ógvusligar sparingar merkja skerdar vælferðartænastur.

Tí er tað sera alvorligt, at politikarar taka avgerðir, sum kosta so dýrt fyri tey, sum búleikast her á landi. Rættindi, sum vera blakað burtur í óðum verkum.


